

# Arbeiðsfólk vilja hava meiri í løn

**Øll arbeiðarafeløgini eru samd um at siga sáttmálan við arbeiðsgevararnar upp og tað er onki at ivast í, at eitt av krøvunum verður at lønin skal hækka**


BAKKAFROST



Bakkafrost samtakið framleiðir laks og líðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum, 1 kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES.

Tað starvast umleið 300 fólk í samtakinum.

Maskinmeistari

**Søkt verður eftir maskinmeistara/ maskinmanni til Faroe Salmon Processing.**

Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving. Arbeitt verður saman við einum maskinmeistara á einari av tveimum skiftivaktum.

Tann, ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Starvið verður sett skjótast tilber.

Løn og setanartreytir eru í samráð við leiðsluna.

**Starvsstaður:** á Glyvrum.

**Umsóknarfreist er :** 30/11

Áhugað biðjast senda umsókn til:

Faroe Salmon Processing
Bakkavegur
FO-625 Glyvrar
kari@bakkafrost.com

Bakkavegur 8 · FO-625 Glyvrar · Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com · www.bakkafrost.com


SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey tímaløntu í Føroyum vilja nú hava meiri í lønarposan.

Tað er greitt eftir at tey fimm arbeiðarafeløgini í Føroyum hava stungið høvdini saman seinastu tíðina at tosa um støðuna hjá limunum.

Og hóast tað enn eru heilir fimm mánaðir eftir til sáttmálarnir við arbeiðsgevararnir fara úr gildi, er tað longu nú greitt, at allir sáttmálarnir verða uppsagdir.

Sáttmálarnir ganga út á midnátt tann 30. apríl og tey fimm arbeiðarafeløgini eru longu nú samd um at siga sáttmálarnar upp.

Her er talan um Føroya Arbeiðarafelag, umframt arbeiðara-og arbeiðskvinnufeløgini í Klaksvík og í Havn.

### Betri løn og hægri viðbøtur

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tað er onki at ivast í at nøkur av krøvunum verða, at lønin onkusvegna skal upp.

- Vit eru fyrst og fremst samd um, at viðbøtur, sum hava staðið í stað í fleiri ár fyri ávís arbeiði, nú skulu hækkas.

- Hon sigur, at tað er eisini væntandi, at krav fer at verða sett fram um, at sjálv tímalønin skal hækka.

Men so langt eru tey ikki komin enn, tí nú skal eitt útgreiningar arbeiðið gerast fyri at staðfesta, hvussu gongdin í keypiorkuni hevur verið seinastu árini.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at verkamannafeløgini vilja eisini hava aðrar ábøtur í sáttmálan, men tað fær hon onki sagt um enn.

### Ein lodrøtt...

Men tað er í øllum førum greitt at eitt høvuðskrav hjá arbeiðarafeløgunum verður at fáa ein fastlønarsáttmála fyri tey, sum arbeiða á fiskavirkjum.

- Arbeiðsgevarafelagið hevur ongantíð av álvara vilja samráðst um ein fastlønarsáttmála fyri tey, sum arbeiða á flakavirkjum men tað ætla arbeiðarafeløgini nú aftur at fáa dagsskrá av álvara, sigur Ingeborg Vinther.

Samstundis vísir hon sostatt aftur páhaldinum frá arbeiðsgevarunum herfyri um at tað eru verkafeløgini, sum hava beint fyri samráðingunum um ein fastlønarsáttmála.

- Arbeiðsgevararnir løgdu eitt uppskot fyri okkum, sum ikki kundi góðtakast, men teir nokaðu at víkja frá tí og sostatt kom tað ongantíð so frægt sum til samráðingar. Tí gjørdu verkafeløgini eit mótuppskot, so at vit høvdu tvey upplegg at samráðast út frá. Men tað hava arbeiðsgevararnir ikki havt áhuga fyri yvirhøvur og tí hava ongar samráðingar verið, sigur Ingeborg Vinther.

### FAKTA

Undir sáttmálasamráðingunum í 2007 legði Føroya Arbeiðsgevarafelag uppskot fyri tey fimm arbeiðarafeløgini um fastlønarsáttmála í fiskivinnuni. Hetta var ætlað sum grundarlag, ið partarnir kundu arbeiða víðari við. Hetta vann ikki frama hjá arbeiðarafeløgunum, og arbeitt varð ikki víðari við hesum undir sjálvum samráðingunum í 2007.

Tann 6. juni 2008 varð aftur fundur ímillum partarnar, har arbeiðarafeløgini løgdu sínar hugsanir um ein fastlønarsáttmála fram. Málið hevur síðan verið tikið fram av og á, men orsakað av innanhýsis trupulleikum á fakfelagssíðuni, er arbeiðið at koma á mál við einum slíkum, ongantíð veruliga byrjað.

*Vinnuhúsið sigur, at hetta er orsøkin til at tey ongan veg eru komin við samráðingunum um fastlønarsáttmála arbeiðsfólk á fiskavirkjum*